Fylgiskjal 13

LM-031/2022

Til

Føroya løgmann, Bárður á Steig Nielsen
Landsstýrismannin í Fíggjarmálum, Uni Rasmussen
Landsstýrismannin í Umhvørvis- og Vinnumálum, Magnus Rasmussen

Betri barsilssømdir og javnstøða millum foreldur

Í sambandi við lønarsamráðingarnar 2022 seta Akademikarafelag Føroya, Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya, Yngri Læknar í Føroyum og Yrkisfelagið Miðnám við hesum fram felags ynski um betri barsilssømdir til pápar og sammøður. Hetta er samstundis ein áheitan á almenna arbeiðsgevaran um at taka ítøkilig stig til at tryggja betri javnstøðu millum foreldur í sambandi við barnsburð.

Sum er gevur barsilsskipanin foreldrum rætt til gjald í sambandi við barsilsfarloyvi í 56 vikur tilsamans. Mamman hevur rætt til 4 vikur undan ásettari føðing og 14 tær fyrstu vikurnar eftir barnsburð, meðan pápin ella sammóðirin hevur rætt til 4 vikur saman við mammuni, og foreldrini hava síðan 34 vikur at býta sínámillum, sum tey tó ikki kunnu brúka samstundis.

Frá 2017 hava foreldur, sett eftir sáttmálum hjá undirritandi feløgunum, havt rætt til barsilsfarloyvi við løn í 28 vikur. 4 vikur undan mettari føðing og 24 vikur eftir føðing. Hetta hevur Fíggjarmálaráðið tulkað soleiðis, at eftir viku 14 kunnu foreldrini býta tær 10 eftirverandi vikurnar sínámillum eftir egnum ynski. Víðari hevur Fíggjarmálaráðið tulkað ásetingarnar í sáttmálunum soleiðis, at um pápin ella sammóðurin tekur tær 10 vikurnar, so skulu hesar takast beint eftir tær fyrstu 14 vikurnar, t.e. í viku 15-24. Sostatt skal alt barsilsfarloyvi við løn sambært sáttmálunum avgreiðast tær fyrstu 24 vikurnar eftir barnsburð.

Síðani 2017, er barsilsfarloyvið longt við 6 vikum, men eingin samsvarandi broyting er gjørd í farloyvistíðini við løn sambært sáttmálunum.

Tá løgtingslógin um barsilsskipan varð broytt í 2020 varð nevnt í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, at:
Hagtøl úr Føroyum og hinum Norðurlondunum vísa, at pápar fara í barsilsfarloyvi so leingi, sum barsilsfarloyvið við lóg er markað til teir. Avleiðingin av lógaruppskotinum kann tí væntast at verða, at mammur fara at vera í barsilsfarloyvi í 48 vikur í mun til 44 vikur, sum nú.

Hetta vísti seg tíverri at halda, og fakfeløgini eru sannførd um, at ein týðandi orsøk er, at ungar barnafamiljur ikki hava ráð til at missa lønarinntøkur.

Frágreiðingin um 37 tímar arbeiðsviku, sum Fakfelagssamstarvið lat gera í 2021, vísir eisini á trupulleikan við, at alt ov fáir pápar taka barsilsfarloyvi. – Har verður m.a. ført fram, at pápar heldur tvørtur ímóti arbeiða meira enn fulla tíð fyri at tryggja familjuni støðuga inntøku. Hetta hóast teir hava ynski um at arbeiða minni og vera meira um familjuna og nýfødda barnið. Páparnir arbeiða sostatt meira enn undan barnsburðinum, fyri at kompensera fyri lønarmissin hjá mammuni og harvið húskinum. Ein orsøk til hetta halda vit er, at gjaldið úr barsilsskipanini er so lágt – í mesta lagi kr. 25.000, sum er væl undir sáttmálalønina hjá okkara limum.

Henda fráveran hjá kvinnum frá arbeiðsmarknaðinum hevur m.a. ávirkan á lønarinntøku, eftirlønarsamansparing og onnur ognarviðurskifti hjá kvinnum í Føroyum. Um pápin tók ein størri part av barslinum, so hevði hetta sannlíkt eisini minkað um varandi minkingina av lívsløninni hjá mammuni.

Tí ynskja undirritaðu fakfeløg, at tær 6 vikurnar, sum barnsburðafarloyvið tilsamans varð longt við í sambandi við broytingarnar í løgtingslógini um barsilsskipan í 2019 og 2020, skulu markast til pápan ella sammóðrina, og at tey fáa fulla løn í tíðarskeiðinum. Samstundis eiga tær 4 vikurnar, ið pápin ella sammóðirin kunnu taka saman við móðirini, eisini at vera við fullari løn. Royndirnar higartil vísa, at hetta er ein fortreyt fyri, at bæði foreldrini hava møguleika at vera um barnið fyrsta árið.

Eisini eiga vikurnar við løn eftir 14. viku, at kunna leggjast, tá tað hóskar til tørvin hjá familjuni, og ikki bert fyrstu 24 vikurnar, sum nú er. Verandi skipan er óneyðuga tvørlig og ein forðing fyri, at pápar ella sammøður kunnu taka lønt barsilsfarloyvi. Eingin forðing er fyri hesum í barsilslógini.

Hesar lutfalsliga smáu stillingar høvdu tilsamans verið eitt ítøkiligt stig á javnstøðuleið.

At enda verður heitt á almenna arbeiðsgevaran um at tryggja, at leiðslurnar á almennum stovnum eggja báðum foreldrum til at taka lut í barnsburðarfarloyvinum, eins og vit í seinastuni hava sæð, at privatu arbeiðsgevararnir gera tað. Greiður boðskapur frá arbeiðsgevaranum kann hava stóran týdning fyri, um pápar velja at taka lut í barslilsfarloyvinum.

Tórshavn hin 14. September 2022

Akademikarafelag Føroya
Yngri Læknar í Føroyum
Yrkisfelagið Miðnám
Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya